HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavn, hin 15. september 2003
Málnr.: 4409 - 200100510-7
Málsviðgeri: EMJ / tlf.: 35 64 13 / MVD

# Útfylling av váttanarskjali (CVED, komið í sept. 2003)

## Vegleiðing til innflytarar

**Fyrri partur (síða 1) skal útfyllast av skipaavgreiðara ella tí fólki, sum hevur ábyrgdina av farminum, sum er lýst í "Rådets derektiv 97/78/EF, artikel 2, stk. 2, litra e)." Nærri upplýsingar eru niðanfyri fyri hvønn teigin. Seinni partur (síða 2) verður útfyltur av marknaeftirlitsfólkinum.**

*Alment:* Skjalið skal útfyllast við blokkbókstavum. Krossur verður settur í rætta kassan. Um ein teigur ikki hevur týdning ella kann veljast frá, skal allur tann talmerkti teigurin ógildast ella tíðiliga strikast út.

Skjalið skal útfyllast í sambandi við allar sendingar, sum koma inn á eina marknaeftirlitsstøð. Hetta er galdandi uttan mun til, um sendingin lýkur øll ES-krøv og skal seljast frítt í ES, um hon skal kanaliserast, ella talan er um sendingar, sum ikki lúka ES-treytir og eru ætlaðar til umlasting, skulu á frígoymslu ella í fríøki, á tollgoymslu ella á skipsprovianteringsgoymslu. Kanaliseraður flutningur vísir til sendingar, sum eru góðkendar sambært artikkul 8 í direktivi 97/78/EF, men verða verandi undir veterinereftirliti, til tær eru komnar fram til eina ávísa, endaliga adressu, har víðari viðgerð av vøruni vanliga fer fram.

Tilskilanin ISO-koda vísir til altjóða landastandardkoduna uppá 2 bókstavir hjá hvørjum landi sær.

---

**Teigur 1**
Avsendari/útflytari: her skal standa navn og adressa á handilsfelagnum, sum sendir sendingina (í triðja-landinum).

**Teigur 2**
Marknaeftirlitsstøð: um upplýsingarnar ikki eru prentaðar á skjalið frammanundan, skal hetta útfyllast av eftirlitsfólki á marknaefrtirlitsstøðini.

**Teigur 3**
Móttakari: Her skal setast adressan hjá tí fólki ella handilsfelagi, sum tilskilað í triðjalandsskjalinum.

**Teigur 4**
Tann, sum hevur ábyrgdina av sendingini (eisini umboðsfólk ella skipsavgreiðari): Tað fólkið, sum er lýst í artikul 2, stk. 2, litra e), í direktivi 97/78/EF, sum hevur ábyrgdina av sendingini, tá hon verður sýnd fram á Marknaeftirlitsstøðini, og sum avgreiðir neyðugu fráboðanirnar til almennu myndugleikarnar vegna innflytaran: navn og adressa skal tilskilast.

**Teigur 5**
Innflytari: innflytarin kann vera staddur langt frá marknaeftirlitsstøðini: navn og adressa verður tilskilað. Eru innflytari og umboðsfólk sama fólk, tilskila so "Sum í teigi 4".

**Teigur 6**
Upprunaland: tað landið, har vøran er endaliga framleidd, viðgjørd ella pakkað.

**Teigur 7**
Avsendaraland: tað landið, har sendingin er lastað ella umlastað fyri seinastu ferð, í endaliga flutningsfarið, sum skal flyta vøruna, við ES sum endamáli.

**Teigur 8**
Adressan í ES skal tilskilast. Hetta er bæði galdandi fyri vørur, sum lúka krøvini (teigur 19), og vørur, sum ikki lúka krøvini (teigur 22).

**Teigur 9**
Her skal upplýsast, nær sendingin/sendingarnar eru væntandi á marknaeftirlitsstøðina. Dato og klokkutíð.

**Teigur 10**
Heilsuváttan/-skjal: Nummar: Tað almenna eintýdda nummarið á váttanini skal upplýsast. Dagur: tann dagur, tá ið embætisdjóralæknin ella annar ábyrgdari hjá myndugleikunum undirskrivaði váttanina/skjalið. Fyri vørur frá einum løggildaðum ella skrásettum virki ella flutningsfari skal navn, og eftir umstøðunum, løggildingar- ella skrásetingarnummarið skrivast.

**Teigur 11**
Neyvir upplýsingar um flutningsfarið, sum vøran kemur við: um við skipi, skal skipsnavn og farmabræv upplýsast.

**Teigur 12**
Slag av vøru: slag av djóri, hvørja viðgerð hevur vøran fingið, tal og slag av kolli, **t.d. 50 kassar á 25 kg ella tal á bingjum.** Krossur verður settur í kassan útfyri flutningshitanum hjá vøruni.

**Teigur 13**
KN-koda: í minsta lagi 4 tey fyrstu tølini í týðandi KN-koduni í tí samansetta nomenklaturinum skulu uppgevast.Hesar kodur standa í *Rådets forordning (EØF) nr. 2658/87,* við seinastu broyting. Hesar kodur eru eisini skrivaðar í *Komissionens beslutning 2002/349/EF* (hesar eru júst tær somu sum altjóða HS-kodurnar). Um skjalið inniheldur sendingar við fleiri ymiskum vørukodum, kunnu vørukodurnar eisini skrivast á váttanarskjalið/CVED.

**Teigur 14**
Bruttovekt: tann samlaða vektin í kg. Verður allýst sum samlaða vektin av vøruni íroknað pakkitilfar, tó ikki bingjur og flutningstól.

**Teigur 15**
Nettovekt: vektin í kg av sjálvari vøruni uttan pakkitilfar. Verður lýst sum "massin" av vøruni uttan pakning av einum hvørjum slag. Aðrar eindir verða nýttar, um vektin ikki er relevant.

**Teigur 16**
Vísast skal til øll segl- og bingjunummur, um tað hevur týdning.

**Teigur 17**
Umlasting: hesin teigur verður nýttur, um so er, at vørusendingin skal til marknaeftirlit á aðrari marknaeftirlitsstøð. Tað vil siga, um sendingin skal víðari við øðrum flutningsfari, antin til innflutnings í ES ígjøgnum eina aðra marknaeftirlitsstøð í EF/EØS, ella um sendingin skal víðari til annað triðjaland. Animo-eindarnummar á marknaeftirlitsstøðini, sum vøran skal til.

**Teigur 18**
Transit: til vørusendingar, sum ikki uppfylla ES-krøv, og sum skulu víðari til eitt triðjaland ígjøgnum ES, antin eftir landsvegi, við toki, sjóvegis ella eftir innanlandsvatnvegum.

**Teigur 19**
Vørur, sum uppfylla krøvini: allar vørur, sum koma við tí fyri endamáli at fara í frían handil í samhandilsøkinum í ES. Hetta er eisini galdandi fyri tær vørur, sum kunnu góðkennast, men eru umfataðar av eini kanaliseringsmannagongd, og tær vørur, sum eru góðkendar og verða lagdar á tollgoymslu til seinni tollingar, antin í tolløkjum, har marknaeftirlitsstøðin hoyrir til ella aðrastaðni.

Vørur, sum ikki uppfylla krøvini: vørur, sum ikki uppfylla ES-krøv, og sum eru ætlaðar til fríøki, frígoymslur, tollupplag, skipsprovianterings-goymslur ella skip ella transit til eitt triðjaland.

**Teigur 20**
Endurinnflutningur vísir til vørur, sum hava uppruna í einum ES-landi, men eru avvístar í einum triðjalandi, og afturvístar til upprunavirki í ES.

**Teigur 21**
Samhandilsøki: hetta vísir til vørur, sum hava frítt at fara í ES við sølu á samhandilsøkinum sum endamál. Tað verður settur krossur við, hvat vøran er ætlað til. Hetta er eisini galdandi fyri sendingar, sum eru góðkendar, og sum verða lagdar á tollgoymslu til seinni tollingar, antin í tolløkjum, har marknaeftirlitsstøðin hoyrir til ella aðrastaðni.

**Teigur 22**
Hesin teigur skal útfyllast fyri allar ES-vørur, sum ikki uppfylla ES-krøv, tá ið sendingin, undir veterinerum eftirlititi, verður send á goymslu á einum fríøki, tollgoymslu ella skipsprovianterings-goymslu.

*Viðmerking:* Teigur 18 og 22 eru bert galdandi í sambandi við veterinerar mannagongdir.

**Teigur 23**
Undirskrift: undirskriftin bindur eisini undirskrivaran at taka transitsendingar aftur, um hesar verða avvístar í einum triðjalandi.